# Ávarar ímóti at gera manningina á strandfaraskipunum til tænastufólk

**– Ein tænastumannaskipan er ikki til at liva við hjá eini nýmótans fyritøku, sigur stjórin á Strandferðsluni**

ARBEIÐSSTEÐGUR OG STRANDFERÐSLA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Ein tænastumannaskipan er ein skipan, sum hoyrir miðøldini til og sum ikki er til at liva við hjá eini nýmótans fyritøku, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni*

– Ein tænastumannaskipan er ikki ein skipan, sum ein nýmótans fyritøka kann liva við.

Tað heldur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni.

Seinastu tíðina hevur nógv verið tosað um at finna eina varandi loysn, so at skipini hjá Strandferðsluni ikki longur verða rakt av ósemjum á arbeiðsmarknaðinum.

Í hesum sambandi hevur mest verið tosað um at gera manningarnar á skipunum hjá Strandferðsluni til tænastufólk, tí so hava tey ikki loyvi til at fara í verkfall.

Men hevur ávarar stjórin á Strandferðsluni staðiliga ímóti.

– Ein tænastumannaskipan loysir trupulleikarnar við verkføllum. Men ein slík skipan ber so nógv annað í sær, at tað er als ikki til at liva við hjá eini nýmótans fyritøku, sigur Kristian Davidsen.

– Skal manningin á Strandferðsluni gerast til tænastufólk, snýr tað seg um nógv fólk, so tað er eitt ómetaliga stórt stig at taka og eg ávari staðiliga ímóti at leypa í eina slíka skipan.

Hann vísir á, at allastaðni rundanum okkum royna tey av øllum alvi at sleppa av við tænastumannaskipanir og tað gera vit eisini hjá okkum.

Einastu tænasufólk, sum skjótt eru eftir, eru tey allarovastu toppembætisfólkini í almennu umsitingini.

Hann vísir á, at er talan um tænastufólk, missir arbeiðsgevaran ein stóran part av sínum rættindum og tað bindur arbeiðsgevaran nógv meiri enn hann er bundin nú, eitt nú sambandi við uppsagnir, har tænastufólk hava trý ára uppsagnartíð.

– Tískil er tað ómetaliga torført at umskipa ein stovn, eitt nú til eitt alment partafelag, ella at laga ein stovn til nýggjar tíðir, táið fólkið er tænastufólk.

Hinvegin hava tænastufólk rættiliga stóra trygd í starvinum og tað er sjálvandi gott.

– Men verður trygdin ov stór, skerst ikki burtur, at tað er í hvussu so er ein ávísur vandi fyri, at tað gerast ein koddi og at tað kann føra til ein ávísan ineffektivitet í stovninum.

Hann heldur eisini, at ein tænastumannaskipan fær ikki trupulleikarnar at hvørva.

– Trupulleikarnir vilja vera teir somu, men við eini tænastumannaskipan er vandi fyri at teir veksa seg størri og størri í gerandisdegnum, uttan at tað ber til at loysa teir.

– Tí ræður um at finna eina skipan, sum loysir sjálvan trupulleikan og ikki bara viðgerð sjúkueyðkennini, sigur strandferðslustjórin.

### Kann als ikki góðtakast

Annars heldur Kristian Davidsen, at tað er undarligt, at Føroyar skulu vera einasta land um okkara leiðir, har tað ber til at leggja alt landið lamið og har landið verður kutað sundur í fleiri vikur.

– Tað er ikki til at liva við og kann als ikki góðtakast, heldur stjórin á Strandferðsluni.

Tí vónar hann annars, at tað ber til at finna eina skipan, sum tryggjar, at hesi øki ikki verða løgd lamin.

– Men tað má gerast við eini skipan, sum hoyrir nútíðini til og ikki við at gera fólkið til tænastufólk, tí tað er ein skipan, sum hoyrir miðøldini til, sigur Kristian Davidsen.

– Tað, sum hendir í Føroyum, kemur ikki fyri aðrastaðni og tað er ikki tí, at tey eru tænastufólk aðrastaðni, leggur hann afturat.

# Skilja ikki limirnir sundir í ymsar bólkar

**Starvsmannafelagið er ikki áhugað í at finna eina serliga skipan sum ger, at strandfaraskipini ikki aftur verða rakt av arbeiðssteðgi. Maskinmeistarafelagið sigur, at skulu teirra limir missa verkfalsrættin, verður tað ikki ókeypis**

ARBEIÐSSTEÐGUR OG STRANDFERÐSLA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Sáttmálaøkið hjá Starvsmannafelagnum er ein heild og vit ætla ikki at býta limir okkara sundurí bólkar við ymsum rættindum.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum er lítið hugaður at ganga ynskinum hjá landsstýrinum á møti um at finna eina serliga skipan so at skipini hjá Strandferðsluni ikki longur verða umfatað av arbeiðssteðgi.

Hann sigur, at politikarar hava eisini eina ábyrgd fyri at hava skipað viðurskifti á árbeiðsmarkaðinum, men í samráðingunum hesuferð løgdu teir nettupp upp til tað øvugta, bæði við at almannakunngera frammanundan, at ongin lønarhækking skuldi vera og við at hótta við at fáa løgtingið at leggja upp í.

– At arbeiðssteðgir raka ymisk øki í samfelagnum og at teir raka hart summastaðni, er júst ætlanin fyri at fáa eina skjóta loysn og tað eru spælireglarnar.

Gunnleivur Dalsgarð er samdur við landsstýrið í, at tað er ein mannarættir at kunna ferðast um firðir og sund, eins og ígjøgnum tunlar og eftir vegum.

– Tað hava vit minst líka stóran áhuga í og tað verður ikki ein trupulleiki, fyrrenn sáttmálaloysi er og tað eru reglarnar.



*– Tað hevur elvt til stórt forargilsi, at strandfaraskipini verða løgd so oftani, tá ið arbeiðsteðgur er. Stendur tað til landsstýrið, verður nýggi Smyril eisini byrjanin til nýggjar tíðir á hesum øki, men fakfeløgini eru meiri ivasom*

Gunnleivur Dalsgarð leggur kortini afturat, at enn hevur hann ikki sæð eitt útspæl frá landsstýrinum og tí vil hann ikki siga, um felagið er sinnað at fara í samráðingar um eina aðra skipan.

– Tað havi eg ongar viðmerkingar. Hann vil fyrst síggja eitt útspæl frá landsstýrinum, áðrenn hann sigur meiri um tað.

– Vil onkur tosa við okkum um ymisk viðurskifti, eru vit sinnað at tosað, tí tað eru vit altíð

Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum, sigur stutt, at hann hevur ikki sæð nakað útspæl frá landsstýrinum og tí ber ikki til at siga nakað um tað.

Men hann leggur kortini afturat, at skulu limir í maskinmeistarafelagnum siga verkfalsrættin frá sær, skulu teir hava okkurt afturfyri, tí tað verður ikki ókeypis.

## Málið um uppílegging varð tikið aftur

Í Sosialinum leygardagin høvdu vit samrøðu við løgmann um, at tað kendist sum ein stórur lætti, at tað slapst undan at biðja Løgtingið leggja upp í arbeiðssteðgin. Landsstýrið varð til reiðar at leggja uppskot fyri tingið um at longja sáttmálan hjá teimum, sum sigla við Strandferðsluni so at skipini komu aftur í sigling.

Men tá ið partarnir fóru til samráðingar aftur mikudagin, varð uppskotið tikið aftur.

Í greinini stóð at málið varð ikki tikið meiri aftur enn so, at endaði tað ikki við semju hósdagin, hevði tað verið lagt fram aftur.

Í hesum sambandi er neyðugt at nágreina, at tá løgmaður segði bara, at tá ið partarnir fóru aftur til samráðingar, varð málið tikið aftur, uttan at nevna nakrar tíðarfreistir.

–Àki–